# Glyvradalur



*Rasmus Glyvradal*

Vanur lá dalur frá fornari tíð
Latin úr alvísum hondum
í eystri sæst havið við Lambalíð
alt albeitt at fjørusondum

So friðfylt reisir seg Glyvrafjall
Við liðina Gásafelli
Høgaleiti og Reynabrúgv
Hvítna av mosa og elli

So grøn er líðin og ovara lág
og Tungubrúgv er har digst íhjá
Við spælandi lombum um summartíð
Á hjálmabakka og grasgóðu líð

Nú stoytt er við klettin um Kópafles
Tað andar av hvirru um flúr og nes
Um Skammarøkur og Illendisstøð
Grasgóðan haga til ovastu røð

Góðveður tám hylir hól og heyt
Ógloymandi summarløtur
Brandandi sól á vesturleið
Gyllir Glyvradals fløtur

**John Reynbú 20/3-08**

# Tórbjørn Mikkelsen deyður

Gjáramorgunin andaðist Tórbjørn Mikkelsen, fyrrverandi stjóri á Toll- og Skattstovu Føroya, 71 ára gamal. Tórbjørn Mikkelsen var havnarmaður, sonur Ásu, f. Haraldsen og Gunnar Mikkelsen. Hann vaks upp á Trapputrøðni við Tinghúsvegin. Øll síni virknu ár var Tórbjørn í starvi á Gjaldstovuni – seinni Toll- og Skattstovuni, har hann var í meira enn hálva øld, og fyri hetta varð hann heiðraður við riddarakrossinum frá Margretu Drotning.

Tórbjørn Mikkelsen var virkin á nógvum økjum, ikki minst innan ítrótt. Serliga tilknýtið var hondbóltsfelagið Kyndil og fótbóltsfelagið B36. Í fleiri ár var hann í hondbóltsnevndini hjá ÍSF. Í september í 1970 vóru Eyðbjørg og Tórbjørn á hondbóltskongress í Madrid at fáa føroyskum hondbólti altjóða viðurkenning. Á veg heimaftur 26. september í 1970 datt flogfarið niður í Mykinesi. Tórbjørn kom skjótt fyri seg aftur eftir vanlukkuna, men Eyðbjørg fekk eina longri sjúkralegu. Nakað seinni fekk føroyskur hondbóltur altjóða viðurkenning.

Í 1971 varð Tórbjørn valdur í umboðsráðið hjá Havnar Sjúkrakassa og kom í nevndina í 1980. Hann bleiv valdur til formann í Havnar Sjúkrakassa í 1990, og var hann tað, til hann segði seg frá í 1998, men ístaðin var hann valdur til nevndarlim. Hann hevur verið formaður í Meginfelag Sjúkrakassa Føroya síðan 1986. Hann var sostatt framvegis virkin sum samskipari í hesum týðandi samfelagstátti, sum m. a. stendur fyri samráðingum við læknar í lønar- og øðrum málum.

Nú hann doyði, var hann formaður í Felagsnevnd Føroysku Fráhaldsfelaga. Hann var eisini í redaktiónsnevndini av 100 ára ritinum hjá losjuni Støt Viljen, sum kom út í 2005.

Tórbjørn var giftur við Eyðbjørg, f. Joensen, sum eisini er virkin í fráhaldsrørsluni. Tey eiga dóttrina Brynhild, fødd í 1964 og sonin Regin, føddur í 1968. Barnabørnini eru 6 í tali.



†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Stinu Højgaard á Toftum** fer úr kapellinum á Landssjúkrshúsinum týsdagin klokkan 18 í Fríðrikskirkjuna á Toftum. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 14. Sungið verður sálmabókini.

**Esther Fuglø**, ættað úr Søldafirði, andaðist mikudagin, í Keypmannahavn, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður leygardagin 31. mai kl. 11.00 frá Baptist Kirken í Fredrikshavn.

### Føroyskur Reyða Kross-studentur



23. mai tók Maria Magnussen úr Tórshavn studentsprógv á Red Cross Nordic United World College í Norra.

**Dagurin**

**29. mai. Maximinus**, deyður í 352. Biskupur í Trier í Fraklandi. Á ferð til Miklagarðs at royna semju í kirkjuligum stríði doyði hann.




†

**Esther Johannesen**
fødd Elendersen,
Toftir, Hvalba
búsitandi í
Kristianssand, Noreg.

doyði í gjáramorgun,
85 ára gomul.

